KUNDARÁÐGEVI

## Kundaráðgevi til avbjóðandi starv í Kollafirði

Vit sóknast eftir kundaráðgeva til deild okkara í Kollafirði.

Sum kundaráðgevi fært tú stórar avbjóðingar í tøttum samarbeiði við hini starvsfólkini á deildini.

**Starvið**
Tín fremsta uppgáva verður at veita kundanum heildarráðgeving. Dentur verður lagdur á ráðgeving um øll viðurskifti av týdningi fyri kundan, m.a. innlán, útlán, pensjón, íløgur, tryggingar og gjaldsmidling.

**Uppgávurnar hjá tær fevna um**
– ábyrgd og røkt av egnum kundum
– heildarráðgeving og sølu
– kredittviðgerð
– ymiskar ad-hoc uppgávur

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja okkum ein jaligan starvsfelaga við góðum samstarvsevnum, hugi og evni at arbeiða við kundum, og sum kann ganga undan.

Vit vænta, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi, og at tú hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi.

**Fakligir eginleikar**
Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving, eitt nú peningastovnsútbúgving.

Starvið verður sett skjótast gjørligt og løn verður ásett sambært avtalu.

Áhugað kunnu seta seg í samband við Øssur Skeel Nolsøe, økisleiðara, tel. 548300 ella Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðara, tel. 348510, teldupostur marjun.eystberg@sparikassin.fo

Umsókn skal vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. desember kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Føroya Sparikassi
Att.: Marjun Eystberg
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn

VASTI 459010

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið Inni og Eik Bank. Í samtakinum starvast 259 fólk og á deildini í Kollafirði starvast í løtuni 4 fólk.

FØROYA SPARIKASSI




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki sum avloysara til Akfaradeildina at byrja 2. januar 2007. Starvið er fyribils tíðaravmarkað til 1 ár. Talan er um fulltíðarstarv.

**UPPGÁVAN**
Uppgávan fevnir m.a. um:

· Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
· Skráseting av akførum
· Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
· Eftirstøðumál
· Kassauppgerð

**FØRLEIKAKRØV**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

**SETANARTREYTIR**
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi **1. desember 2006.**

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo



# Móttøka

Í sambandi við at starvsfelagi okkara, Gunnbjørg Rubeksen, gevst á Realinum eftir nærum 35 ár í starvi, bjóða vit til móttøku fríggjadagin 1. desember 2006, kl. 15 – 17. Móttøkan verður hildin í hølunum hjá Realinum í Niels Finsensgøtu 39. Øll eru hjartaliga vælkomin.



Niels Finsensgøta 39
P.O.Box 367
110 Tórshavn

Tel 311 410
realkredit@realkredit.fo

Realurin
FØROYA REALKREDITSTOVNUR

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tít hava søgur, hugskot og tips ella um tít vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VAKT